

www.oljan.fo

**Jan Müller** 20 - 02 - 2013

# Bjóða verkfrøðingum oljupartabrøv

Tað er framvegis stórt trot á verkfrøðingum í norsku oljuvinnuni, og tí ræður um at brúka allar snildir fyri at fáa fatur á verkfrøðingum. Tað seinasta er, at fyritøkan GMC í Stavanger er farin at bjóða verkfrøðingum partabrøv í fyritøkuni, um teir vilja taka av tilboði um arbeiði. GMC er tænastufyritøka og veitir ymsar tænastur í sambandi við skip og oljupallar. Stjórin, Gunnar M. Christensen (vm. á myndini), sigur við Aftenbladet, at tey hugsaðu um fleiri møguleikar. Ein var at bjóða fólki meiri løn, enn onnur feløg bjóða, ein annar var at keypa eitt verkfrøðingafelag, men tey valdu tann triðja møguleikan. -Vit stovna eitt dótturfelag, GMC Engineering. Vit eiga 51 prosent av tí, og hini 49 prosentini fáa fimm royndir verkfrøðingar, sum skulu virka sum kjarnin í tí nýggja felagnum. Teir fáa partabrøvini fyri ein lægri prís, soleiðis at íløgan ikki verður nakar fíggjarligur váði fyri teir. Á tann hátt vóna vit at fáa fatur á nøkrum royndum verkfrøðingum, sigur Gunnar M. Christensen og lggur afturat, at so skjótt úrslitið loyvir tí, fáa eigararnir vinningsbýti. Eindømi Astrid Oline Ervik, arbeiðsmarknaðargranskari, sigur við Aftenbladet, at so vítt hon veit, er hetta fyrstu ferð, at ein norsk vinnufyritøka bjóðar fólki partabrøv fyri at fáa fatur á arbeiðsmegi. -Tað er ikki óvanligt, at fólk fáa tilboð um partabrøv sum ein part av samsýning ella løn, men eg veit einki dømi um, at ein størri fyritøka bjóðar fólki ognarlut í fyritøkuni, soleiðis sum GMC ger, sigur granskarin. Hon leggur afturat, at við hesum háttinum kann tað vera lættari at fáa fatur á teimum røttu persónunum.